# Gudloysi, til frama fyri øll

HEINI REINERT

Vegnað Gudloysi

Fyri at ein kristin skal uppfatast sum missionerandi, má hann ágrýtin banka á hurðar, deila faldarar út á Vaglinum ella fara til Afrika at spreiða gleðiboðskapin. Ein gudloysingur hevur eyðsæð heitið, missionerur uppiborið, bert tí hann ikki dylur sína vantandi sannføring. Hesa dupultu meginreglu kundi ein ognað sær við at lurta eftir Bergi Debes Joensen, presti, í Degi og Viku, tann 26. august. Umboðar vantandi trúgv veruliga eitt so ómetaliga sannførandi trúarvirði? Er tað nóg mikið fyri ein gudloysing at vera til fyri at umvenda fjøldina til síni sjónarmið? Ella er tað so einfalt, at Bergur Debes Joensen hevur misskilt Gudloysi á einum til grundleggjandi støði?

Í mun til illgruna Joensens, hevur Gudloysi ongar ætlanir um at ræna frá fólki teirra átrúnað. Vónandi verður missionering aldrin eitt punkt á endamálsorðing felagsins. At vilja áleggja øðrum sína egnu lívsáskoðan er í grundini eitt tekin um eina ómetaliga persónliga óvissu. Tí um tíni sjónarmið veruliga hava hald í veruleikanum, kann onki verðins vald vika sannleikavirði teirra. Hvussu ber tað til, at stigið til at stovna eitt felag fyri føroysk tortrúgvin verður sædd sum ein hóttan mótvegis kristnu virðunum? Er tað ein hóttan ímóti virðunum hjá øðrum at halda fast við rættin at hava egin virðir? Er tað ein hóttan, ikki at vilja vera tvungin av meirilutanum til at játta nøkrum, ein ikki kann taka undir við?

Bergur Debes Joensen krevur, at limir felagsins kunngera alment, hvønn gud, felagið trýr á. Hví Joensen heldur seg hava heimild til at seta slík krøv, er ilt at siga. Tó er støða felagsins til gudar als ongin loynidómur, og ein skuldi trúð, at navn felagsins veitti eina greiða ábending. Gudloysi er eitt felag fyri føroyingar, ið eru ivasamir viðvíkjandi tilveruni av gudum – øllum gudum. Hóast felagið fegið vil koma øllum á møti, er tað av givnu orsøkum tíanverri ógjørligt at svara spurningi Joensens.

Limir felagsins trúgva ikki upp á nakran gud, og kunnu tí ikki geva Joensen nakað, ið hann kann samanbera við sín Kristus. Hvørja lívsáskoðan limir felagsins annars hava, blandar felagið seg ikki í. Gudloysi er eitt felag fyri tortrúgvin av øllum slagi, tað verið seg ateistar, agnostikarar, fríteinkjarar, sekulerar humanistar, eksistentialistar, nihilistar, buddhistar, taoistar o.s.fr. Hvørji endamál og tiltøk felagið velur at virka fyri, verður avgjørt gjøgnum samráðingar og atkvøður limanna millum. Tó kann nevnast, at eitt av høvuðsendamálum felagsins er at virka fyri skilnaði milum kirkju og stjórn. At verðsliggera samfelagið er ikki at vera ímóti átrúnaði. Tvørturímóti er einasti hátturin at vera fyri átrúnaði sum heild at nokta, at nakar serstakur átrúnaður fær sersømdir. Hetta áttu sjálvt trúgvandi at verið samd um, tí tað kann helдur ikki vera stuttligt hjá teimum tá annar átrúnaður verður trokaður inn á tey.

Til dømis legði eisini Jógvan Fríðriksson, bispur, í kringvarps-tíðindunum tann 25. august stóran dent á týdningin í at hava frælsi til at velja átrúnað frá. Beint eftir vendi hann tó á eini knappanál, og mótsegði sær sjálvum við at siga seg vera ímóti sekularisering. Á hvønn hátt kunnu fólk, ið ikki eru kristin, sigast at hava frælsi til at velja kristindómin frá, um lógarásetandi stjórn landsins er óloysiliga vígd til átrúnað meirilutans? Tað er lítið annað enn missionering, ásett av stjórnini. Tað er at vanvirða frælsi, tolsemi og fólkaræði. Fólkaræði, ið ikki hevur virðing fyri frælsi hins einstaka, og ikki veitir javnsett rættindi til øll, verður ikki verandi eitt fólkaræði. Tað verður til meirilutans einaveldi.

At stovna ein felagsskap, ið virkar fyri at skilja sundur kirkju og stjórn, er upp á ongan máta missionerandi. Tvørturímóti er tað at leggja grundvøllin fyri veruligum trúarfrælsi. Gudloysi er einasti bólkur í Føroyum, ið treytaleyst er fyri øllum persónligum átrúnaði.

Gudloysi kann røkkast á t-post addressuni:

Gudloysi@gmail.com

# Logikkur framum alt annað

EYÐSTEIN POULSEN



Í politikki er brúk fyri jarðbundnum heildarhugsandi menniskjum. Tey fólkavaldu mugu hugsa breitt. Meirilutin av vællærda fólkinum, ið nú situr á Tingið, hevur ein ódámligan spesial teoretiskan veruleika, ið ikki tekur logikk í álvara.

**Heimsbúskapurin er settur uppá prøva**

Vit hava hoyrt serfrøðingar, enntá frá tingsins røðarapalli siga, at spátt verður um ein oljuprís, ið ljóðar uppá 600 dollarar fyri tunnuna. Síðan verður víst á, at vit mugu regulera okkara fiskivinnu til hendan prísin. Somuleiðis vísa hesir serfrøðingar á, at vit í skundi mugu broyta samfelagið til hendan fiktiva veruleika.

Mítt logiska boð upp á oljuprísin er, at vit als ikki koma har til sum spátt verður. Oljuídnaðurin fellur eisini, um bert ein promillu partur av heiminum, hevur ráð til at gjalda fyri oljuna. Heimurin er allur sum hann er, knýttur saman í eina ketu. Um størsti parturin av heiminum ikki megnar at gjaldi fyri dýru oljuna, ja, so slitnar ketan, og so hava vit tað, ið nógv verri er enn 600 dollarar fyri tunnuna. Um prísurin kemur har til, eru tað heilt onnur viðurskifti, ið vit skulu fyrihalda okkum til.

Serfrøðin skyldar heiminum eina grundleggjandi frágreiðing uppá, hvar áleið hægstamark liggur fyri oljuprísin, ið flest fyritøkur og hartil flestu heimsborgarar kunnu liva við.

Eg meti, at vit koma at hava ein óstabilan oljuprís í komandi framtíð. Hvussu leingi kunnu vit bert gita um. Síðan fer oljuprísurin aftur niður á eina legu, har heimurin fær møguleika at tillaga seg til aðra orku enn oljuna. Fara vit at hyggja, hvar oljuídnaðurin ger íløgur í løtuni, so er tað sjónligt, at grøn orka er framtíðar inntøkan hjá nútíðar oljufeløgum. Tí meti eg, at sjokkherferðin er lukkast til fulnar hjá oljuídnaðinum.

Sjokkoljuprísurin, ið vit nú uppliva, er bert ein fiktivur veruleiki, ið vit ikki eiga at umbyggja samfelagið uppá við skundi. Vit eiga at halda hjólini malandi, og samstundis seta okkum skilagóð og langtíðar mál viðvíkjandi orkuni her heima. Heildar logikkur við øllum heimsins aspektum, eiga at vera grundarlag fyri framtíð okkara hesum viðv.

**Fiskivinnu logikkur**

Vit eiga at halda okkum til logikk, framum teoriir, ið hava víst sín skeivleika. Vit eiga ikki at løggeva flotan á heysin. Vit eiga at fyrihalda okkum til ein heildarveruleika, og ikki pilka ósamsvarandi teoriir burturúr, ið passa best til eins egna veruleika. Hetta er um at syndrað okkara fiskivinnu. Lat okkum ikki leggja okkum á somu leið viðv. orkuspurninginum.

### Tankar í samb við Dag og Viku 26. august 2008:

# Um felagið Gudloysi og trúgv

BERGUR D. JOENSEN



Felagið Gudloysi er eitt áhugvert felag, tí nú fær ein kanska fyri fyrstu ferð møguleika at hoyra, hvat hesin bólkur í samfelagi okkara heldur. Men eg vildi ynskt, at sæð grundarlagið og endamálið hjá hesum felag.

Felagið Gudloysi hevur lógartryggjan rætt at vera í landi og okkara, og skal ta fáa sama rætt og somu sømdir sum øll onnur lóglig feløg. Vit eru felags um nógv, men ikki um alt. Men eitt, sum vit eru felags um, er at hava eina heimsmynd og eina trúgv.

Øll hava vit eina heimsmynd, og øll hava vit eina trúgv, sum lýsir tað hvørt einstakt menniskja heldur um grundleggjandi viðurskifti. Eisini tann, sum sigur seg vera gudloysing, hevur okkurt, viðkomandi roknar við ella lítir á. Spurningurin er tí ikki, um ein hevur eina heimsmynd, men hvør eins heimsmynd er. Spurningurin er ikki, um ein hevur eina trúgv, men hvør eins trúgv er.

Allar heimsmyndir ella trúgvir hava setningar, sum vit kunnu kalla lærusetningar. Hesir setningar lýsa grundleggjandi viðurskifti og fevna um upprunan til heimin og lívið, um menniskja, um rætt og rangt, um ævinleikan osfr..

Sjálvur meini eg, at øll hava ein gud ella gudar við lítlum "g", men ikki øll hava Gud við stórum "G". Gudur ella gudar okkara umboða okkara heimsmynd ella trúgv. Ein gudur er tað, sum fólk seta fremst í sínum lívi, sum dregur tey, og sum stýrir lívi teirra. Tað, sum Jesus hevur verið fyri menniskju á okkara leiðum, hevur Mao verið fyri kinverjum. Tá ið Nietzsche segði, at "Gud er deyður", hendi tað, at hann avnoktaði Gud við stórum "G" og festi sítt álit á ein annan gud við lítlum "g".

Tað áhugaverda um okkum menniskju er tað, vit eru felags um. Vit hava samvitsku, tørv fyri kærleika og umsorgan, vilja skapa og arbeiða, ganga við somu spurningum um lívið og ævinleikan, vit minnast, vit leingjast, vit gleðast, vit syrgja. Men í okkum er tráanir eftir t.d. peningi og makt, sum ikki nýtast at vera synd ella nakað galið í sjálvum sær, men hesar tráanir kunnu lættliga gerast girndir.

Um girndir eftir tí verðsliga ráða einum, kann ein kallast materialist. Jesus kallaði henda lívsháttin ein gud, Mammon. Profetarnir nevndu hann Baal. Ofta verður Mammon ella Baal umtalaður sum høvuðsmótsetningurin til Gud Ábrahams, Ísaks og Jákups.

Um ein sjálvur til avgera, hvat er rætt og rangt, kann ein kallast verðsligur humanist. Verðsligi humanisturin trýr á menniskja, og at einki er hægri enn tað. Kristni humanisturin (hetta heitið var vanligt undir trúbótini) trýr hinvegin á Jesus Krist.

Og hvørt ein hugsar, at alheimurin og lívið er vorið til av tilvild ella av einum skapara (sum í t.d. í "Intelligent Design") verður sagt, at ein ávikavist hellir til menningarlæruna ella skapanarlæruna, at ein ávikavist er "darwinist" ella "creationist", sum summi kalla hesar áskoðanir, og sum báðar eru grundaðar á trúgv. At prógva upprunan til lívið, eins og ein kann prógva at 2+2=4, hevur ikki borið til. Tú kanst trúgva hesum, ella tú kanst trúgva hasum.

Gudloysi merkir í einum kristnum samanhangi ikki, at ein hevur onga heimsmynd ella trúgv, men, at ein hevur eina aðra heimsmynd og eina aðra trúgv enn ta kristnu. Gudstrúgv hevur á okkara leiðum verið trúgv á Jesus Krist. Munurin á trúgv millum manna hevur her verið lýstur, sum munurin á at trúgva á Kristus ella ikki.

Av tí at tað eru tey, sum trúgva á Jesus, men ikki hava nakað við hann at gera, kunnu vit býta sokallaðar gudloysingar í tvinnar bólkar: Tey, sum ikki trúgva at nakar gud er til (teoretiskir gudloysingar verða hesi rópt), og tey, sum trúgva á Jesus, men sum ikki geva sær fær um hann (praktiskir gudloysingar). Tvs., at sjálvt kristin menniskju kunnu í roynd og veru liva sum gudloysingar. Gud hevur einki "perkeringspláss" í lívi teirra, sum ein segði.

Til tey fyrru sigi eg: ert tú ærlig / ærligur, hevur tú óivað onkran gud (við lítlum "g"). Til tann seinna sigi eg: ert tú ærligur / ærlig, hevur tú óivað tørv á at fáa viðurskifti tíni við Gud (við stóru "G") í lagið aftur.

At hitta menniskju á máli um øll viðurskifti – eisini viðvíkjandi áskoðan og trúgv, er uppgávan hjá kirkjuni og einum presti. Sum ein, sum hevur verið í hesum arbeiði í fleiri ár, dámar mær betur at tosa við ein, sum er ósamdur við mær um lívsins stóru mál enn ein, sum er líkasælur.

Felagið Gudloysi er ikki ein hóttan fyri nakran uttan tann, hetta felag hóttir. Og eg veit ikki, um hetta felagið hóttir nakran sum so. At siga, sum í yvirskriftini í Degi og Viku 26. aug., at undirritaði sær felagið Gudloysi sum eina "hóttan", er at gera ov nógv av. Heldur er felagið ein "avbjóðing".

Sjálvur fekk eg tvær útsagnir í áðurnevndu tíðindasending, og er tað ikki nógv um eitt so týðandi mál. Men hesi eru helst korini í tíðindasendingum í modernaðum sjónvarpi. Men eg ynski og fleiri við mær, at SvF kann fáa eina kjaksending á skránna, sum grevur djúpari og gevur betri umstøður at siga sína hugsan um trúgv og tilverumál. Vanligar eru slíkar sendingar í útlendskum sjónvarpsrásum sum t.d. DR1 og BBC.

Lat okkum virða øll sjónarmið og vera góð hvør við annan, men lat okkum eisini vera tað, vit eru.

*(Til tann, sum vil lesa um heimsmyndir og trúgv. James Sire: Verdensbilleder, Credo; Aksel Valen-Sendstad: Religionsfilosofi, Koleon og Heini í Skorini og Páll Holm Johannesen: Krossvegir, Sprotin. Um kristindómin: Dietrich Bonhoeffer: Efterfølgelse og C.S. Lewis: Berur kristindómur, Sprotin)*